## Airbus í Vágum

Eitt Airbus A319 flogfar við plássi fyri 136 ferðafólkum lendir í Vágum, og harvið verður staðfest, at tað er eingin trupulleiki at lenda í Føroyum við størri flogfari enn teimum, sum í løtuni røkja ferðafólkaflúgvingina.

Atlantsflog ætlar sær undir at endurnýggja flotan hjá sær, og talan kann gerast um at keypa størri flogfør enn tey, sum flogfelagið hevur í løtuni.

Tíkom Airbus-flogfarið, sum kostar einar 220 milliónir krónur, roynd-artúr til Føroya.

## Mary og Fríðrikkur fingu ein son

Ein nýggjur danskur trúnarvingur kemur til verðina á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn leygarnáttina 15. oktober, og tað er ein drongur, sum Mary og Fríðrikkur fáa. Hann vigar 3500 gram og er 51 sentimetrar til longdar.

Fríðrikur krúnprinsur var sera glaður á at líta á tíðindafundinum, ið hann helt beint áðrenn hálvgum níggju leygarmorgunin. Hann var móður, men segði seg vera sera ernan av konu síni, ið hevði klára hetta sera væl. Hann helt sjálvur, at hann hevði verið ein góður stuðul hjá krúnprinsessuni og hevði gjørt sítt fyri at hjálpa.

## Flakavirkini bløða út

Støðan í flakavinnuni er vánalig, og stjórin í Norðoya Sparikassa heldur, at eisini framtíðarútlitini eru døkk.

– Tað eru longu nógv arbeiðspláss burtur í fiskivinnuni á landi, og verður eingin broyting næstu tíðina, so verður arbeiðsloysi í hesari vinnu stórt næsta ár ella longu í ár, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Fleiri virki hava ligið still seinastu tíðina, tí tey klára seg ikki, og sum tað sær út í løtuni, so hava flakavirkini onga framtíð, sigur hann.

## Verkfallið endar við semju

Fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum fáa eina 0,9 prosent í lønarhækking, og nýggi sáttmálin er bara galdandi í eitt ár. Tað verður úrslitið av samráðingunum millum tað almenna og fakfeløgini, eftir at verkfall hevur verið í eina viku. Løgtingið var á veg at leggja upp í verkfallið, tá ið partarnir sjálvir funnu eina loysn.

*[ Oktober ]*

# 4000 fólk tóku ímóti nýggja Smyrli



*Eini 4000 fólk vóru umborð og hugdu eftir nýggja Smyrli, tá ið hann kom til Suðuroyar, og tað vóru bara góð orð at hoyra um skipið. Endligi kostnaðurin fyri skipið gjørdist slakar 270 milliónir krónur, men tað verður sagt, at tað kostaði minst tvífalt so nógv hjá IZAR-skipasmiðjuni at byggja skipið*

**Nýggi Smyril fekk eina stórfingna móttøku, tá ið hann kom til Suðuroyar mitt í verkfallinum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Ferðin heim gekk avbera væl og allan leygarmorgunin lá Smyril eystanfyri Suðuroynna og bíðaði eftir klokkuni, so hann kundi koma til lands**

Tað vóru sjálvandi nakrir heilt fáir suðuroyingar, sum høvdu fingið sær seyð at fletta leygardagin. Men næstan allir hinir vóru á Tvøroyri og tóku ímóti nýggja Smyrli, tí hóast tað var reiðiliga illsligt við regni og fitt av vindi, vóru eini 4000 fólk á samferðsluhavnini á Tvøroyri og tóku ímoti nýggju ferjuni. Her skal havast í huga, at tað búgva bara 5000 fólk í Suðuroy.

Fyrst gingu hundraðtals fólk skrúðgongu av gomlu samferðsluhavnini á Drelnesi, út í nýggju Samferðsluhavnina á Krambatanga, sum er ein lítlan kilometur ytri á fjørðinum. Har vóru røðu hildnar, hornorkestrið spældi og felagssagnur var, áðrenn hekkuportið fór upp og fólk fingu høvi til at sleppa umborð at síggja skipið.

Fyri ikki at dálkað ov illa, fingu øll skóleistar úr plasti upp á beinini. Teir høvdu 3000-4000 skóleistar og teir vórðu allir brúktir og tí fæst ein reiðiliga góð ábending um, hvussu nógv fólk var umborð.

### Vælegnaður

Og tey vóru øll sum ein samd um, at her var talan um eitt avbera stásiligt far. Hóast vit fleiri ferðir hava hoyrt, hvussu stórur og flottur Smyril er, vóru øll mestsum ovfarin tá ið tey komu umborð og sóu við egnum eygum, hvussu stórfingin hann í verleikanum er.

Skiparin Pauli Larsen ivast heldur ikki í, at Smyril verður eitt gott skip til Suðuroyarfarleiðina.

– Tað er heilar 24 metrar breitt, sum er 7-8 metrar breiðari enn Smyril I er, og sostatt er tað ógvuliga stútt í sjónum Harafturat er forskipið ógvuliga slankt, so hann er smíðaður til at skera seg ígjøgnum alduna og fer ikki at bresta so illa, tá ið hann er ímóti, sigur skiparin.

### Góðar umstøður

Umborð eru nógvir leysir stólar og tað hava fólk fýlst á, men tey, sum hava havt við skipið at gera, siga, at tað er so gott í sjónum, at tað verður ongin trupulleiki.

Annars eru eisini ein hópur av bleytum, djúpum benkrum, ið mest av øllum líkist sofum, so har er eisini nógv betri pláss at leggja seg enn umborð á Smyril, sum nú fer í søguna.

Men vil onkur hava kamar, ber eisini til at fáa eitt slíkt umborð, og tey eru bæði góð og rúmlig. Annars eru eisini flúgvarasetur at sita í.

Tá ið fólk fóru í land aftur av Smyrli, var farið í høllina í Trongisvági, har tiltak varð alt kvøldið og alla náttina við, og tað var alt ókeypis.

Av tí at veðrið var so illsligt og tað gekk so illa atfáa hekkuportrið niður, vóru tað nógv fólk, sum fóru avstað aftur, uttan at hava verið umborð.

Tí var Smyril somuleiðis opin fyri almenninginum sunnudagin og eisini tá var reiðiliga nógv fólk umborð.

» Listastevnan hevur kostað ov nógvar pengar, og Norðurlandahúsið hevur brúkt ov stóran part av sínum pengum til hetta einstaka tiltak, sum fer fram í einum stuttum tíðarskeiði um summarið, tá ið annars eina rúgva av øðrum tiltøkum eru í landinum. «

*- Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum.*

» Av náttúru eri eg eitt ógvuliga opið menniskja, haldi eg sjálv, og tað fer vónandi at seta sín dám á mítt yrki her í Føroyum. Tað er eisini umráðandi at duga at tosa við fólk í einum slíkum starvi, og tað meti eg sjálv, at eg dugi. «

*- Karen Marie Olesen, nýggjur fúti*

**B36 vinnur føroyameistaraheitið í mansfótbólti eftir avgerandi dyst ímóti HB. Hjá kvinnum verður KÍ føroyameistari sætt árið á rað.**